## TIL ARBEIÐIS

**LAGT TIL RÆTTIS:** Vilmund Jacobsen, vilmund@sosialurin.fo



# FAKTA:

**Navn:** Karin Meyer
**Starv:** Sjálvstøðug vinnurekandi
**Besta við starvinum:** Nøgd viðskiftafólk
**Ringasta við starvinum:** Mær dámar tað bara...
**Starvsfólk:** 3
**Stjóri:** Karin Meyer

*– Eg plagi at siga, at hetta er ein mótahandil fyri øll. Hevur tú keypt tíni klæði her, kanst tú til eitt hvørt høvi kenna teg "ráelegantan", sum Karin Meyer brosandi tekur til*

**MYND:** JENS KRISTIAN VANG

# Byrjaði í ringastu **kripputíð**

– EG TÍMI **IKKI** AT SELJA **KLÆÐI** TIL **KONUFÓLK**. TANN **AVBJÓÐINGIN** ER EFTIR MÍNUM TYKKI **IKKI** SO **STÓR**, SUM AT SELJA KLÆÐI TIL **MANNFÓLK**. EG FEKK **ÁHUGA** FYRI **MANNFÓLKAKLÆÐUM**, TÁ EG ARBEIDDI HJÁ **FEÐGUM**. HALDI, AT HETTA ER EIN **INSPIRERANDI** UPPGÁVA. **MANNFÓLK** FARA VANLIGA **IKKI** ÚT AT KEYPA **KLÆÐI** – BARA FYRI AT KEYPA KLÆÐI. TEY FARA **OFTAST** IKKI, FYRR ENN TEY SKULU **BRÚKA** OKKURT, SIGUR **KARIN MEYER**

Karin Meyer eigur handilin Kallkyn í Vágsbotni sum selir mannfólkaklæði. Hon byrjaði sítt handilsvirksemi í Tórsgøtu hin 29. oktober í 1992 – góðar tríggjar vikur eftir, at Sjóvinnubankin var farin á húsagang. Hetta var í ringastu kreppu í Føroyum í nýggjari tíð, og tað fara vit at venda aftur til.

Í eini fýra ár var adressan hjá Kallkyn í Tórsgøtu, men øll árini síðan hevur Kallkyn húsast í Grím Kambandsgøta 3 – ella í Vágsbotni, ið flestu siga, sum húsast her niðri við sjóvarmálan.

– Árini 1988-1990 arbeiddi eg hjá Fljóðinum hjá Sunnevu Gram, sum dóttirin, Marja Gram, nú rekur. Haðani fór eg at arbeiða hjá Feðgum, sum Kári Müller átti, og her var eg onnur tvey ár, árini 1990-1992, sigur Karin.

Tað var hendan tíðin, sum birti áhugan hjá henni at gerast sjálvstøðug vinnurekandi.

### Størri avbjóðing

Men, hví valdi Karin Meyer júst at selja mannfólkaklæði burturav?

– Eg tími ikki at selja klæði til konufólk. Tann avbjóðingin er eftir mínum tykki ikki so stór, sum at selja klæði til mannfólk. Eg fekk áhuga fyri mannfólkaklæðum, tá eg arbeiddi hjá Feðgum. Haldi, at hetta er ein inspirerandi uppgáva. Mannfólk fara vanliga ikki út at keypa klæði – bara fyri at keypa klæði. Tey fara oftast ikki, fyrr enn tey skulu brúka okkurt.

Karin vísir á, at hon var 45 ára gomul, tá hon í 1992 fór undir egna fyritøku.

– Tankin rann mær til hugs, um eg nú skuldi arbeiða restina av arbeiðslívinum fyri onnur – ella, um eg skuldi royna meg sum sjálvstøðug vinnurekandi.

Hon ásannar, at tað var ein ógvuliga stór avbjóðing at fara undir handilsvirksemi í ringastu krepputíð.

– Men eg havi verið ógvuliga glað fyri, at eg tók hetta stigið, tí tað hevur verið spennandi og gevandi, leggur hon aftrat.

Karin sigur, at Føroya Sparikassi og stjórin, Eyðun á Rógvu, trúðu upp á hennara ætlan, og har fekk hon tað, sum restaði í fyri at reisa ein nútímans mótahandil á føtur.

### Klæðir til øll

– Eg legði stóran dent á, at hetta skuldi vera nýggjur og hugnaligur handil við stórum og áhugaverdum útboði til dreingir, ungar menn og til ungar eldri menn, sum hon tekur til.

Hon leggur aftrat, at Kallkyn altíð hevur verið handilin, har menn kunnu klæða seg »presentabult« til eitt og hvørt høvi – og ikki minst hevur hetta verið handilin við teimum røttu prísunum.

– Eg havi altíð lagt stóran dent á, at klædnavørurnar ikki skulu kosta meiri, enn tær »eiga« at kosta. Hetta trúgvi eg roynist best í longdini. Selir tú vørurnar dýrari, enn tær eiga, bítir hetta seg í halan, sum tíðin gongur. Tá snýtir tú ikki bara kundan, men í longdini eisini teg sjálva.

Karin sigur, at øll mannfólk kunnu klæða seg við tí, sum Kallkyn selir – frá innast til uttast, og felags fyri hennara viðskiftafólk er og skal verða, at tey kenna seg væl í pløggum frá Kallkyn.

– Eg plagi at siga, at hetta er ein mótahandil fyri øll. Hevur tú keypt tíni klæði her, kanst tú til eitt hvørt høvi kenna teg »ráelegantan«, sum hon brosandi tekur til.

Hon leggur aftrat, at pápi hennara, sum doyði 95 ára gamal, keypti øll síni klæði í Kallkyn.

– At viðskiftafólk koma aftur, hevur stóran týdning fyri handilsvirksemi í einum so avmarkaðum øki, sum Havnin og Føroyar nú einaferð eru. Hóast eg ikki byrjaði sum sjálvstøðug vinnurekandi fyrr enn í 1992, havi eg í summum førum eini trý ættarlið í somu familju sum viðskiftafólk, og tað er ordiliga stuttligt.

Hon tekur til, at ungir abbar javnan koma á gátt, børnini hjá teimum - sum so aftur koma við sínum børnum.

### Góðir starvsfelagar

Karin Meyer dylur ikki fyri, at hon elskar at handla í Vágsbotni, men tað er eisini munur á, at meiri lív er her niðri nú, enn tá hon byrjaði.

– Eg kundi slett ikki hugsað mær at handla í einum stórum handilsdepli. Umhvørvið her niðri er so deiligt og hugaligt; her er so friðsælt, og hetta er so gott fyri sálina. Eg elski eisini miðbýin í Havn, leggur hon aftrat.

Karin hevur nógv rós at bera báðum kvinnunum, hon hevur í starvi.

– Sunrid á Húsabrúgv hevur arbeitt hjá mær í eini 5-6 ár, og hon er røsk og sera dugnalig. Laila Jacobsen, sum hevur arbeitt hjá mær øll árini – undantikið teir fyrstu mánaðirnar – hevur verið og er mín høgra hond. Nú eg havi verið sjúkrameldað tað mesta av einum ári, hevur Laila eisini verið mín vinstra hond. Tað hevur ikki minst verið Laila, sum hevur skumpað undir meg, tá eg var sjúk, og alt ikki sá so bjart út. Eg havi tvær sera dugnaligar, ábyrgdarfullar og kreativar kvinnur við Sunrid og Lailu.

Karin Meyer vaks upp á Sandi, men 11 ára gomul flutti hon í 1958 til Havnar saman við foreldrum sínum.

– Mamma mín, Asta Meyer, var ættað av Tvøroyri – og pápi mín, Hans Jacob Johannesen, var ættaður av Sandi.

### Spennandi og læruríkt

Meðan vit skifta orð, dettur prátið aftur á tíðina í 1992, tá hon fór undir at reka handil.

– Nógv søgdu, at eg var svøk, og tey høvdu ikki nakrar serligar vónir til, at hetta fór at vera ein góð íløga. Tað var hart viðhvørt, og eg fekk ikki ost upp á breyð hvønn dag, sum hon brosandi tekur til. Men tað hevur gingið, og hetta hevur verið ein ógvuliga spennandi og lærurík tíð, sigur Karin Meyer.